# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hart ella bleytt

Orðaskiftið um fíggjarlógaruppskotið og tjakið í KRV í gjárkvøldið avdúkaði stóru ósemjurnar í samgonguni. Taka vit tingviðgerðina, so sóu vit vanligu samanbrestirnar millum andstøðu og samgongu, og hóast tað mangan gekk harðliga fyri seg, so tóktist ósemjan ikki at stinga so djúpt sum ósemjan í samgonguni.

Andstøðan fanst at landstýrinum fyri ikki at hava eina ætlan, ið røkkur fram um 2010. Andstøðutinglimur gjørdi vart við, at vit ikki kunnu halda fram við einum stórum halli á fíggjarlógini fleiri ár á rað. Hóast hesin er mest brennandi spurningurin í føroyskum politikki í løtuni, so kom einki svar, ið kundi bent á, at landsstýrið hevur eina yvirskipaða strategi.

Tað næsta vit koma nøkrum, sum líkist eini strategi, er umraðfesting av íløgunum, sum miðar ímóti at halda einum ávísum virksemi uppi í ávísum pørtum av landinum og í ávísum pørtum av vinnuni, serstakliga byggi- og handverksvinnuni. Hetta er alt gott og væl, men samstundis má staðfestast, at eingin verulig strategi tykist vera fyri fiskivinnuni, sum jú hevur grundleggjandi týdning fyri allan samfelagsbúskapin. Sum vera man fanst andstøðan júst at hesum veika punkti í politikki samgongunar, men synd er at siga, at andstøðan umframt at finnast at, hevði nøkur ítøkilig uppskot til tess at fáa samfelagið burtur úr í óhepnu gongdini, sum nú gerst alt meira týðulig við vaksandi arbeiðsloysi og álvarsomum trupulleikum innan fiskivinnuna.

Báðir partar talaðu nógv um bygnaðarligu trupulleikarnar, men hvørgin var serliga greiður. Eingin tóktist hugaður til nærri at allýsa, hvørjir bygnaðarligu trupulleikarnir eru. Hetta er spell, tí tað skapar ótryggleika og ein kann hava varhugan av, at hvørki samgonga ella andstøða hava sannkent bygnaðarligu trupulleikarnar innan almenna so væl sum privata geiran. Av somu orsøk kom hvørgin parturin við ítøkiligum hugskotum til loysnir. Tað kann eisini hugsast, at partarnir hava hugskotini, men aftra seg við at koma fram við teimum, tí einhvør loysn á bygnaðarligu trupulleikunum kemur at svíða bæði til løntakarar so væl sum til tey, ið taka ímóti almennum veitingum.

Hólmgongan millum Eidesgaard og Kallsberg avdúkaði djúpa ósemju í samgonguni um raðfestingarnar. Hetta orðaskiftið vísti, at Javnfl. og Sambandsfl. standa saman ímóti Fólkafl., tó so at Gerhard Lognberg helst er meira í parti við Fólkaflokkinum enn við sínum egna flokki. Í stuttum snýr ósemjan seg um raðfesting av íløgusíðuni. Fólkafl., vil tunlar – Javnaðarfl. minus Gerhard og Sambandsfl. vilja røktarheim, serstovar og skúlar. Hetta sigur fíggjarmálaráðharrin er at velja vælferð fram um hørð virði. Annfin sigur tunnlar er vælferð – vælferð fyri útjaðaran. Tað er torført at spáða, hvussu hetta endar. Annfinn plagar at fáa sín vilja, hann hevur jú sum formaður í fíggjarnevndini buktina og báðar endarnar. Ella hevur hann nú tað? So skal hann alliera seg við Tjóðveldi, men orðaskiftið í tingsalinum bendi ikki á hendan møguleikan. Nú fæst at síggja, hvussu leikur fer, enn er alt óvist uttan hetta, at tey, sum nú hava lítið, fara at hava minni eftir 1. januar 2010.

**Sosialurin**

## Sárt hjá Heina og Høgna & Co

JOHAN PETERSEN



**Í 63 ár hevur Heini og alt sítt lív hevur Høgni livað sína politisku tilveru upp á endurtikin ósannindi um, at føringar atkvøddu fyri loysing í ´46. Men eftir at løgtingstíðindi eru blivin atkomulig fyri almenningin, kann ein og hvør staðfesta, hvat veruliga fór fram**

Í longum, stórt uppsettum greinum hava bæði Heini O. Heinesen og Høgni Hoydal í samband við 14. sept.- haldini hjá Tjóðveldinum endurtøkur um, at føringar atkvøddu fyri loysing fyri 63 árum síðan, 14. sept. 1946.

Pástandur teirra er, at fólkaatkvøðan skuldi vera bindandi, at fleirtal var fyri loysing og at løgtingið tók eina lógliga avgerð um loysing.

### Løgtingstíðindi sum almannaogn avsanna mytuna

Men eftir at løgtingstíðindi eru blivin almannaogn á internetinum, ber til at eftirkanna pástandin hjá Tjóðveldinum, øðrum loysingarflokkum og loysingarfólkum.

Tað setti eg mær fyri og fann skjótt út av, at pástandirnir hjá loysingamonnunum milt sagt t eru óseriøsir og villleiðandi.

### Fólkaatkvøðan ikki bindandi

Onki varð staðfest í løgtingslógini um, at fólkaatkvøðan skuldi vera bindandi. Heldur ikki at hon skuldi vera vegleiðandi.

Men bæði Thorstein Petersen, sum var formaður fyri Fólkaflokkin, løgtingsformaður og gekk á odda fyri loysingini og Andras Samuelsen, sum var formaður fyri Sambandsflokkin og gekk á odda fyri framhaldandi sambandi við Danmark, søgdu upp undir fólkaatkvøðuna, at fólkaatkvøðan var vegleiðandi (.... *fyri at fáa leiðbeining.....almenna atkvøðugreiðslu*....[4] og ... *vælgerfolket bør få lejlighed til at udtale sig*... [3]).

### Onki fleirtal, bert tveir minnilutar

Tað verður endurtikið upp í saman, at eitt fleirtal av føringum atkvøddu fyri loysing. Heldur ikki hetta er rætt.

Av øllum møguligum atkvøðum í Føroyum tá, atkvøddu 31% fyri stjórnaruppskotinum, 32% fyri loysing, 33% atkvøddu als ikki og 4% vóru ógildugar.

Ella av teimum 66,4%, sum atkvøddu [2], atkvøddu 47,2% fyri stjórnaruppskotinum, 48,7% fyri loysing og 4,1% av atkvøðunum vóru ógildugar [1].

Sostatt vóru bert tveir minnilutar, óansæð um tú roknar út frá øllum møguligum atkvøðum ella út frá øllum greiddum atkvøðum. Annar minnilutin var gott nokk størri enn hin, men tveir minnilutar vóru tað undir øllum umstøðum. Og tí fullu bæði uppskotini sjálvandi.

Og hetta kenna bæði Heini og Høgni alt til. Tá nevndarálit í løgtinginum verða løgd fram frá eini nevnd við t.d. 7 tinglimum og 3 limir eru samdir um eitt álit, 2 limir um eitt annað og 2 taka støðu í tinginum, er talan um 2 minnilutaálit. Teir 3 limirnir eru ikki eitt fleirtal, men bert ein størri minniluti enn teir tveir, sjálvt um teir 3 eru 50% fleiri enn teir 2.

### Stjórnin tók eina fólkarættarliga støðu

Tá so tingið bleiv upployst og nýval útskrivað, var hetta rætt fólkarættarliga. Tingið hevði jú ikki løggevandi myndugleika tá [7].

Sjálvandi kann eitt ráðgevandi ting ikki taka avgerð um loysing, grundað á ein minniluta, hóast hann er 1,5% størri enn ein annar minniluti, á eini vegleiðandi fólkaatkvøðu.

Og løgtingsvalið 8. nov. 1946 vísti eisini við allari týðuligheit, at føringar ynsktu ikki loysing.

### Heini noktar fakta

Í viðmerking til grein mína sigur Heini O. Heinesen, at óansæð hvat stendur í løgtingstíðindum, hevur hann rætt og matematisku prosentini av fólkaatkvøðuni kann eg hava fyri meg sjálvan.

Hvat skal man tá siga? Eru loysingarfólk veruliga, sum Heini ”uden for pedagogisk rækkevidde?” Sjálvandi er tað sárt hjá bæði Heina og Høgna og øllum øðrum loysingarfólkum at skula viðurkenna veruleikan.

Men óansæð hvussu ofta og í hvussu nógv ár framyvir, at loysingarfólk tvíhalda um, at føringar valdu loysing 14. sept. 46, so er og verður hetta bert endurtikin ósannindi.

Veruleikin er og verður, at ein minniluti, sum var 1,5% størri enn ein annar minniluti, atkvøddi fyri loysing á eini vegleiðandi fólkaatkvøðu, har minni enn tveir triðingar luttóku. Tí fullu bæði uppskotini. Eftirfylgjandi løgtingsval vísti, at føringar ynsktu heimastýrisskipanina.

**Keldur:**

[1] Løgtingstíðindi 1946: vanlig tingseta 1946: 13. Fólkaatkvøðan síða 49. (logting.fo > løgtingstíðindi > løgtingstíðindi vel eldri > 1946 > B.Eykatingsetan apríl-mai 1946 og vanliga tingsetan 1946 > 49)

[2] Anja Andreasen, søgufrøðingur: Sambandsflokkurin í 100 ár síða 229

[3] Løgtingstíðindi 1946: eykatingseta apríl-mai 1946: skjal 8 Nevndarálit Stjórnarskipan Føroya síða 2. (logting.fo > løgtingstíðindi > løgtingstíðindi vel eldri > 1946 > D. Skjøl > 164))

[4] Løgtingstíðindi 1946: eykatingseta apríl-mai 1946: skjal 8 Nevndarálit Stjórnarskipan Føroya síða 3-4. (logting.fo > løgtingstíðindi > løgtingstíðindi vel eldri > 1946 > D. Skjøl > 165 og 166)

[5] Løgtingstíðindi 1946: vanlig tingseta 1946: 13. Fólkaatkvøðan síða 49. (logting.fo > løgtingstíðindi > løgtingstíðindi vel eldri > 1946 > B.Eykatingsetan apríl-mai 1946 og vanliga tingsetan 1946 > 49)

[6] Anja Andreasen, søgufrøðingur: Sambandsflokkurin í 100 ár síða 232

[7] Løgtingstíðindi 1946: eykatingseta apríl-mai 1946: skjal 8 Nevndarálit Stjórnarskipan Føroya síða 4. (logting.fo > løgtingstíðindi > løgtingstíðindi vel eldri > 1946 > D. Skjøl > 166))

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.